

# Ert tú okkara HR leiðari?

Tryggingarfelagið Føroyar er ein fyritøka í stórari menning. Starvsfólkapolitikkur hevur stóran týdning fyri okkum, og vit sóknast tí eftir rætta persóninum at vera við til at menna fyritøkuna og okkara starvsfólk.

Tryggingarfelagið Føroyar stevnir við fullari ferð móti avbjóðingum á altjóða støði. Vit sóknast tí eftir einum HR leiðara at standa á odda fyri at menna okkara 120 starvsfólk, so tey eru rætt útbúgvin, klár til at møta hesi avbjóðing og kunnu tryggja góða tænastu fyri allar okkara kundar. Okkara málsetningur er, at kundin skal vera í tryggum hondum, og at okkara tænasta skal vera á altjóða støði. Fortreytin fyri hetta er trivnaður og arbeiðsgleði í fyritøkuni.

HR hevur stóran týdning fyri fyritøkuna, og tað vilja vit menna. Tú kemur at leiða hetta spennandi arbeiðið. Vit hava til samans 6 skrivstovur í Klaksvík, Saltangará, Tvøroyri, Vági, Sandavági og á Kongabrúnni í Havn, har okkara høvuðssæti er. Fysisku karmarnir eru góðir, arbeiðslagið er gott, og okkara starvsfólk eru dugnalig og væl útbúgvin.

## Tínar uppgávur eru at

- standa á odda fyri starvsfólkadeildini
- hava ábyrgdina av starvsfólkapolitikkinum
- gera eina HR strategi fyri alla fyritøkuna í samstarvi við leiðsluna
- standa fyri og leggja til rættis útbúgvingar fyri starvsfólkið
- vera stuðul og ráðgevi hjá deildarstjórunum og vera við til at seta fólk í starv
- luttaka á leiðslufundum, har starvsfólkamál verða umrødd
- luttaka til lønarsamráðingar og vera við til at fyrireika hesar
- fara ígjøgnum og meta um verandi sáttmálar
- undirvísa innanhýsis í ávísan mun

## Tínir førleikar

Vit rokna við, at tú hevur eina hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni. Tú ert ein persónur, sum tekur ábyrgd, dámar avbjóðingar og ert fyrikomandi. Vit vænta harumframt, at tú:

- ert ein góður leiðari, sum kann ganga á odda at motivera og menna felagið
- brennur fyri HR – bæði fakliga og menniskjaliga
- hevur eyka orku og dugir at lurta og stuðla
- hevur evni at síggja fyritøkuna og tilfeingið úr erva
- hevur menniskjaligar eginleikar
- hevur hollar arbeiðsroyndir

## Løn og setanartreytir

Tú fært eina kappingarføra løn, sum verður ásett eftir nærri avtalu okkara millum.

Starvið hevur tilvísing til varastjóran.

Er hetta nakað fyri teg, ella tú hevur spurningar um starvið, kanst tú seta teg í samband við Edvard Heen, varastjóra á tel 345 502 ella við at senda teldupost til eh@trygging.fo. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

## Umsóknarfreistin er 22. juni 2007

Umsóknir skulu sendast til :
Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

Viðmerk: Umsókn HR leiðari

Ella umvegis www.trygging.fo

Tryggingarfelagið Føroyar P/F Kongabrúgvin - Postsmoga 329 - FO-110 Tórshavn - tel. +298 345600 - tf@trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari